## Gátu ríma

1 Hoyri tit í hesi høll,
innan ein av teim,
hvussu árla legði hann bros
farin í annan heim.

*Treðum lættliga dansi!*
*Dagurin skýnur so fagurliga,*
*komið er hægst a summarið.*

2 Gestur villur frá høllini gongur,
blindur er hann sum fáur,
møtir hann einum gomlum manni,
allur í hárum gráur.

3 Møtti hann einum gomlum manni,
allur í hárum gráður:
Hví ert tú, Gestur blindi, villur,
hví er tu so fáur.

4 Tað er ei so undarligt,
at eg eri tungur til máls:
Illa volda gátur mær,
í morgin missi eg háls.

5 Tað er ei so undarligt,
at eg eri so tungur og stríður:
illa volda gátur mær,
í morgin missi eg lív

6 Hvussu mikið reyðargull
vilt tú geva mær,
inn gangi eg fyri Heiðrik kong
gátur kenni eg har

7 Tólv merkur í reyðargulli,
tað skal verða títt,
gongur tú inn fyri Heiðrik kong
og loysir høvur mítt.

8 Gakk tú tær í grasagarð
og ráð fyri tíni bú:
Eg gangi inn fyri Heiðrik kong
og gátur kenni nú.

9 Tríati eru gáturnar,
git mær ein av teim:
Hvussu eitur tann reyða trumma,
ið slær yvur allan heim?

10 Vita man eg gátuna,
eg sigi tað fyrstu av teim:
Toran eitur tann reyða trumma,
ið slær yvur allan heim.

11 Hoyr tú Heiðrik, kongur mín,
hvar veist tú teir grannar:
Gangar báðir um einar dyr,
og hvørgin kennir annan?

12 Hugur mín og hugur tín
teir eru einir grannar,
ganga báðir um einar dyr,
og hvørgin kennir annan.

13 Hoyr tú Heiðrik, kongur mín,
hvar veist tú teir brøður:
Liggja úti á útskerum,
og hava ei faðir ei møður?

14 Eystfall og vestfall
mega væl kallast brøður,
liggja úti á útskerum,
og hava ei faðir ei møður.

15 Hoyr tú Heiðrik, kongur mín,
hvat man tað nú vera:
Bleytt sum dún og hvítt sum fonn
og hart sum hornið harða?

16 Hoyr meg Gestur blindi,
eg gátuna kenna mann:
Sjógvurin bæði bleytur og harður,
hvítt stendur brim á land.

17 Hoyr tú Heiðrik, kongur mín,
hvar veksur tann viður,
rótin hvørvir til himmals upp,
og skarðið hvørvir niður?

18 Glerpípan í homrum uppi,
hon er eingin viður,
rótin hvørvir til himmals upp,
og skarðið hvørvir niður.

19 Hoyr tú Heiðrik, kongur mín,
hvar veist tú teir skóðir,
høgdir verða á hvørji halgu,
tó er viður nógvur?

20 Skeggi er á hvønsmans høku,
tað er eingin skógur,
rakað verður á hvørji halgu,
tó er viður nógvur.

21 Hoyr tú Heiðrik, kongur mín,
hvar veist tú teir brøður,
vaksa upp í eini høll,
og hava ei faðir ei møður?

22 Torvkongul og brennistein
teir eru einir brøður,
vaksa upp í eini høll,
og hava ei faðir ei møður.

23 Súgvin gongur til sína skemmu,
glymur á grønari grund,
galtar grynta, grísar stynja,
hvørt av sínum munni?

24 Vita man eg gátuna,
eg sigi tað allvæl satt:
Hamari er í hvørji smiðju,
hann fellur rætt og slætt.

25 Vita man eg gátuna,
er mær ei á tí hól:
Óðin ríður sínum hesti
bæði á land og sjó.

26 Vita man eg gátuna,
eg fari ei við tí hátt:
Óðin ríður sínum hesti
bæði á dag og nátt.

27 Óðin gjørdis villini fuglur,
fleyg sær út úr høll,
brendi inni Heiðrik kong
og har til hirðini øll.

28 Óðin gjørdis villini fuglar,
fleyg sær út í hav,
brendi inni Heiðrik kong
og alt tað lið har varð.